Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

INFORMASJÓNSSTARV Á HAGSTOVUNI

EIN HEIMASÍÐA VIÐ INFORMASJÓN UM ALT SAMFELAGIÐ - ER TAÐ NAKAÐ FYRI TEG?

Hagstovan sóknast eftir einum fólki, sum skal vera við til at útgeva hagtøl og informasjón um samfelagið á heimasíðuni hjá okkum www.hagstova.fo. Starvið er í fyrsta umfari tíðaravmarkað til eitt ár, við møguleika til at gerast varandi starv.

Vit hava eina heila lítla organisasjón til at framleiða og savna hagtøl um eitt breitt úrval av viðurskiftum, sum hava týdning fyri øll. Uppgávan er at geva informasjónini eitt snið ella skap, sum kann gera turr hagtøl áhugaverd, lesiverd og atkomulig hjá øllum.
Hevur tú áhuga í hagtølum, áhuga í informasjón sum heild, hevur tú evnini til at siga eina søgu í tølum og texti, ella royndir av at arbeiða við heimasíðuforritum av ymsum slag, ert tú vælkomin at søkja starvið. Hevur tú útbúgving sum miðlagrafikari ella aðra viðkomandi miðlaútbúgving, er tað ein avgerandi fyrimunur. Royndir í líknandi størvum telja sjálvsagt eisini við í metingina.

Tú kemur at starvast í einari organisasjón, sum hevur til uppgávu at upplýsa um samfelags-viðurskifti sum heild og sum er snikkað til at loysa júst tað uppgávuna. Títt íkast verður at gera hesa informasjón tøka á internetinum við fleiri ymsum amboðum og tillaga ymiskan lesaratørv.
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Landsstýrið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir skulu stílast til Hagstovu Føroya, Glyvursvegur 1, 165-Argir, ella sendast við telduposti til hagstova@hagstova.fo. Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 20. september og byrjast skal í starvinum skjótast til ber.

Vilt tú vita meira um starvið, ber til at venda sær til Hermann Oskarsson á Hagstovuni, tlf. 352800.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO

ÚTBJÓÐING

Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið viðvíkjandi Tekniska Skúla í Klaksvík, "Útbygging av HT Deild", boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðið verður boðið út í hesum arbeiðstøkum
A. Stórarbeiðstøka (jørð- og kloakk-, betong-, stál-, timbur- og snikkaraarbeiði v.m.)
B. Múraraarbeiði
C. Málaraarbeiði
D. Gólvarbeiði
E. HVS- og Ventilatiónsarbeiði
F. El-arbeiði

Útbjóðingartilfarið skal bíleggjast í seinasta lagi 20. september 2006 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 5.000 kr. fyri hvørja arbeiðstøku, ið verður at flyta á konto nr. 9181 – 134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er sent aftur óskalað í seinasta lagi eina viku aftaná lisitatiónina, tað er 31. oktober 2006.

Lisitatiónin verður á Tekniska Skúla, Nýggivegur, Klaksvík, týsdagin 24. oktober 2006 kl. 14.00.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78, Tórshavn
Tel 340 800, Faks 340 801
lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK
byggir land

ENDURLÝSING

Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið viðvíkjandi nýggjum Fiskivinnuskúla í Vestmanna, boðið út í almennari lisitatión.

Arbeiðið verður boðið út í hesum arbeiðstøkum
A. Stórarbeiðstøka (jørð- og kloakk-, betong-, stál-, timbur- og snikkaraarbeiði v.m.)
B. HVS- og ventilatiónsarbeiði
C. El-arbeiði
D. Málara-arbeiði
E. Gólv-arbeiði

Útbjóðingartilfarið skal bíleggjast í seinasta lagi 21. september 2006 og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 5.000 kr. fyri hvørja arbeiðstøku, ið verður at flyta á konto nr. 9181 – 134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er sent aftur óskalað í seinasta lagi eina viku aftaná lisitatiónina, tað er 24. oktober 2006.

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegur 5, Tórshavn, týsdagin 17. oktober 2006 kl. 14.00.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78, Tórshavn
Tel 340 800, Faks 340 801
lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK
byggir land

PARTABRØV Í FØROYA SPARIKASSA

petur & petur • 320870

Partabrøv sum vaksa

Føroya Sparikassi stendur í vøkstri, og partabrøvini í Sparikassanum økjast støðugt í virði.
Tú hevur nú møguleika at gerast partaeigari hjá okkum ella ogna tær fleiri partabrøv.
Til 22. september kl. 16 verða partabrøvini seld fyri 330 krónur hvørt.

Vaks saman við okkum.

FØROYA SPARIKASSI